## Fundaðust um 61 kunngerðir

Mána- og týsdagin var Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, vertur fyri danska vinnu- og búskaparráðharran og umboð fyri Tjóðbankan og Fíggjareftirlitið.
Talan er um árligan fund, sum partarnir hava sínamillum, og fyri fyrstu ferð var hesin fundur í ár hildin í Føroyum.
Ein partur av fundarvirkseminum snúi seg um ætlanir at seta eina langa røð av kunngerðum í gildi í Føroyum. Talan er um lógir innan fíggjarheimin, sum higartil hava verið danskar burturav, men har løgtingið í ár hevur samtykt at seta føroyskar kunngerðir í verk.

-jm

## Roykfrítt á Jinx

Á matstovuni Gallarí Jinx í Havn hava tey gjørt eitt roykfrítt øki. Tað er tann parturin í gamla blómuhandlinum hjá Trónd Hansen á Áarvegnum í Havn sum er niðan fyri trappuna, sum er roykfríur til kl 22 á kvøldi.

# Nevndin afturvald

NEVNDARVAL
*www.industry.fo*

Fríggjadagin 10. juni hevði Føroya Arbeiðsgevarafelag aðalfund. Á aðalfundinum stóðu tríggir av nevndarlimunum fyri vali: Bergur Poulsen, Kristoffur Laksá og Leivur Michelsen. Allir vóru afturvaldir og nevndin er sostatt óbroytt. Hinir nevndarlimirnir eru: Jóhan Páll Joensen, Jón Danielsen, Magni Arge og Gudmund Mortensen.
Nevndin hevur skipa seg við Jóhan Páll Joensen sum formanni og Kristoffur Laksá sum næstformanni.
Á aðalfundinum var ársfrágreiðing felagsins løgd fram. Henda viðger samfelagsgongdina, gongdina innan vinnuna og virksemi hjá felagnum. Í formansfrágreiðingini var m.a. hetta drigið fram um gongdina í búskapi Føroya:
Frá mitt í 90'inum til í 2002 høvdu vit blíðan búskaparligan byr. So byrjaði at venda, og í 2003 og serliga í 2004 hevur verið afturgongd í búskapinum.
Arbeiðsloysið er uml. 4%, og tað er vaksandi, hóast tað enn er lutfalsliga lágt. Afturgongdin er serliga eyðsýnd í framleiðsluvinnunum. Har fullu lønarútgjaldingarnar við 9 % í 2004 í mun til undanfarna árið. Í privatu handils- og tænastuvinnunum svarar hækkingin í lønarútgjaldingunum nøkulunda til hækkingina í sáttmálasatsunum. Hinvegin var vøksturin innan tað almenna. Har vuksu lønarútgjaldingarnar við 7 %, sum er fitt meira enn vøksturin í sáttmálalønunum.
Síðani 1999 hevur verið sera stórur lønarvøkstur, og hetta hevur ávirka útreiðslustøðið munandi, og vit hava trupulleikar við kappingarførinum. Støðan seinasta árið er, at støðugt fleiri fyritøkur í framleiðsluvinnunum verða riknar við halli.
Í 2004 høvdu Føroyar eitt hall á handilsjavnanum og væntandi verður hallið í 2005 størri. Sjálvt um føroyski búskapurin ikki beinleiðis er í nøkrum vanda, so er hall á fíggjarlógini, samstundis sum virkini innan útflutningsvinnuna eisini koyra við halli.
Almenna tjaki er tó ikki so dapurskygt sum fyri hálvum til einum ári síðani. Kanska tí nakrir glottar eru at hóma: Alivinnan kann aftur byrja at framleiða, útlitini sýnast bjartari fyri aktiviteti innan olju. Ella kanska hava vit bara vant okkum við, at vit aftur eru í einum aldudali.
Tað sum órógvar Føroya Arbeiðsgevarafelag er tó tað, at afturgongdin seinastu árini ikki bara skyldast konjunkturbroytingar í okkara nærumhvørvi. Afturgongdin skyldast í størri mun bygnaðar-broytingar í altjóða búskapi og handli. Altjóðageringin merkist av álvara. Kappingin er munandi harðna, og framleiðsla flytur hagar, sum bíligast er at framleiða. Prísurin á okkara vørum verður framyvir fyri munandi trýsti, bæði orsaka av bíligari framleiðslu, og av tí at vørurnar nú kappast við fiskasløg úr øllum heiminum.
Neyðugt er, eftir okkara tykki, at nógv størri dynamikkur kemur í føroyskt vinnulív, um vit skulu hava framburð og búskaparvøkstur. Útlendingar síggja møguleikar hjá okkum og gera íløgur, har gongur sjón fyri søgn. Føroysk vinna eigur í nógv størri mun at hyggja út um landoddarnar eftir vinnumøguleikum. Heimurin endar ikki á tveyhundrað fjórðingum úr landi.

Sosialurin
Sosialurin
www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

# Brekað við Norrønu fyri sama prís

**MBF og Smyril Line hava gjørt avtalu um samstarv. Hendan inniber, at rørslutarnað fáa serprís á kømurunum til rørslutarnað**

SAMSTARV
*tíðindaskriv*

Tað var eitt stórt framstig fyri føroysk rørslutarnaði, tá nýggja Norrøna kom til landið. Norrøna er útgjørd við 6 serkømørum fyri rørðslutarnað, og hetta ger, at rørslutarnað hava eins góðar møguleikar at ferðast við Norrønu sum øll onnur.
Øll 6 serkømør hava útsýni og hentleikar ið gera, at tey eru bólkað í dýrastu kamars kategori. Tessvegna kunnu rørðslutarnað, ið vegna teirra rørðslubrek einans hava møguleika at búleikast í serkømørunum, einans velja bestu og dýrastu kamars kategori.
Nú hava MBF og Smyril Line gjørt avtalu um at fólk, ið ikki hava møguleika fyri at búleikast á vanligu kømurunum, men hava fyri neyðini at brúka kømurini fyri rørslutarnað, fáa hesi fyri serprís. MBF og Smyril Line eru samd um týdningin av, at rørðslutarnað hava eins góðar møguleikar og øll onnur, og hettar umfatar eisini atgongd til ferðing. Tað er á hesum grundarlagi, at avtalan er gjørd.

Montørur

Vit søknast eftir montøri at byrja 15. august ella skjótast gjørligt.

Vit bjóða:
- eitt spennandi og fjølbroytt starv
- tryggar arbeiðsumstøður
- gott arbeiðsumhvørvi

Vit vænta av tær:
- at tú hevur royndir sum timburmaður, snikkari e.t.
- at tú ert ágrýtin
- at tú bæði kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni
- at tú ert fyrikomandi og álitandi

Løn:
Løn verður sambært nærri avtalu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Dánjal Paula Poulsen, tel. 21 27 89

Føroya Gluggi pf.
FO-385 Vatnsoyrar - Telefon 33 21 77 - Fax 33 31 66
T-post: post@h-window.fo - Heimasíða: www.h-window.fo

# Klárt til verkætlanarleiðslu

fvl
*tíðindaskriv*

Felagið Føroysk Verkætlanarleiðsla (FVL) hevur nú skipað nevnd og er farið undir at gera virksætlan fyri tiltøk, ið felagið ætlar at fyriskipa í summar og í heyst.
Í nývaldu nevndini sita Árni Jakobsen, formaður, Suni Christiansen, næstformaður, Kári Dal-Christiansen, skrivari, Sigurd L. Lamhauge og Regin W. Dalsgard.
Ætlanin er m.a. at skipa fyri vitjanarferðum til nakrar av teimum verkætlanunum sum eru í gongd í Føroyum í løtuni og fáa frágreiðing um hesar, her dentur verður lagdur á leiðsluliga partin av verkætlanini. Endamál við hesum vitjanum er at víðka kunnleikan um hugtakið verkætlanarleiðslu. Vónin er eisini at tílík tiltøk kunnu menna eitt kontaktnet millum limirnar, soleiðis at teir kunnu heysta av royndum hjá hvørjum øðrum og harvið mennast. Ætlanin er at hava fyrsta tiltakið áðrenn summarfrítíðina.
Felagið er økisfelag undir danska felagnum Dansk Projektledelse (DPL), og er ætlanin hjá føroyska felagnum eisini at kunna um tiltøk, sum limir kunnu luttaka í uttanlands, umframt at kunna um møguleikan at gerast IPMA-sertifiseraður, sum alttjóða viðurkendur verkætlanarleiðari; eitt samstarv, ið DPL hevur við altjóða felagsskapin IPMA (International Project Management Association).
Í næstum verður boða frá virkisætlanini hjá felagnum harundir »á veg heim fundum« og virkisvitjanum.

Lesið Sosialin - so eru tit við